


## Ónøgdir fiskimenn

*Teir fáa ongan arbeiðsloysisstuðul, tí arbeiðsgevarin, sum er trotabúgvið eftir Faroe Fish II, ynskir, at teir eru tøkir í uppsagnartíðini. Nú hava teir vent sær til Sosialin*

**Hví fáa tit ikki ALS-stuðul?**
- Tað er tí, at trotabúgvið í uppsøgnini sigur, at "... í tann mun viðkomandi trolari/-ar fara til fiskiskap í uppsagnartíðini, so ynskir búgvið inntil víðari, at tygum halda tygum tøkan til hetta..."
Men hóast hetta "ynski" um at vera tøkir, hjálptu bústjórar okkum at fylla út umsóknarblað til ALS.

**Hvar sigur ALS?**
- ALS sýtir fyri at ganga umsóknunum á møti, tí "tøkur á arbeiðsmarknaðinum er tann, sum ikki hevur tilknýti til arbeiðsgevara..."
Vit fáa at vita, at umsókn okkara "sostatt ikki kann gangast á møti...".

**Hvat meiri sigur ALS?**
- Í brævinum fáa vit eisini at vita, at "... um so er, at tygum fara at verða fríttstillaður í uppsagnartíðini, eru tygum vælkomin at søkja a um arbeiðsloysisstuðul av nýggjum..."

**Hvat halda tit um hetta?**
- Vit halda tað vera undarligt, at eitt "ynski" hjá bústjórunum skal vera avgerandi fyri, um vit kunnu fáa arbeiðsloysisstuðul ella ikki. Vit undra okkum eisini yvir, at bústjórar, sum eru løgfrøðingar, hjálptu okkum við umsóknarbløðunum, tá vit kortini ongan stuðul kunnu fáa.

**Jamen, eru tit tøkir?**
- Vit halda, at tá vit søkja um stuðul úr ALS, er tað tí, at vit meta okkum vera tøkar á arbeiðsmarknaðinum, siga fiskimenn, sum hava vent sær til Sosialin.

# Nei til hotspots í Havn

**INTERNET** Innlendismálaráðið noktar Tórshavnar Kommunu at seta upp sokallað hotspots - tað er tráðleyst internetsamband - í Havn



Eirikur Lindenskov

Tað var Levi Mørk, núverandi býráðslimur, sum í valstríðnum til seinasta býráðsval sum engdi við, at hann vildi seta upp tráðleys internetsambond ymsa staðni í býnum, um hann varð valdur í býráðið.

Men nú er umsíðir svar komið frá Innlendismálaráðnum, og tað svarið er noktandi. Tórshavnar Kommuna sleppur ikki at seta upp hotspotsøki í miðbýnum, tí tað stríðir ímóti kommunulógini.

- Eg fari eg at leggja hetta mál til endaliga støðutakan hjá Tórshavnar kommunu. Eg fari at spyrja, um Tórshavnar kommuna er samd við niðurstøðuni hjá Innlendismálaráðnum, sigur Levi Mørk. Hann heldur, at kommunulógin átti at verið endurskoðað, tí slíkum fer kommunan ikki á heysin av, heldur hann.

- Talan er bert um hækkan av tænastustøðinum hjá kommununi yvir fyri borgarunum. Hetta kann als ikki berast saman við, um kommunan fór upp í fiskivinnuna, sum onkur kommuna gjørdi á sinni, og harvið varð kommunulógin endurskoðað, sigur Levi Mørk.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur arbeitt við hesum máli seinastu tvey árini, og sambært Levi Mørk hevur hon roynt allar møguleikar.

- Men Innlendismálaráðið loyvirikki kommununi at bjóða hesa tænastu, sum er púra vanlig í grannalondum. Ikki serliga hugaligt ikki at kunna bjóða okkara kommunu fram á hesum kanska vanliga tøkniliga øki. Eisini er hetta ikki serliga lokkandi fyri eina kommunu, sum hevur til slagorð í sinari visjon »at vera virkin og vakin«. Her hugsi eg serliga um okkara útisetar við ti fyri eyga at faa teir heim aftur, sigur Levi Mørk.

Tað einasta sum higartil er framt á hesum øki er, at Býarbókasavnið hevur 3G tráðleyst net til borgaran.

- Tað er at frøast um at eitt nú Landssjukrahúsið hevur hesa tænastu og brýtur onga kommunulóg. Eg fari tí at gera eina roynd aftrat. Og tað verður at fáa málið fyri býráðið til endaliga støðutakan í januar, sigur Levi Mørk, sum vónar, at Innlendismálaráðið ella Dátueftirlitið ikki fer at siga nei til at streama býráðsfundir hjá Tórshavnar Kommunu, um tað skuldi blivið aktuelt.

## Í MORGIN




Skýggjað og regn allan dagin. Hann verður fyrst landsynningur-eystan í ættini, men gongur seinnapartin upp í ein útnyrðing, 7 m/s. Hitin 5 stig.

## MIKUDAGIN




Skýggjað og ælaveður. Hann verður framvegis útnyrðingur, 13 m/s, og hitin 3 stig.

## HÓSDAGIN




Kavaæl og skiftandi skýloft. Norðan, omanfyri 14 m/s. Hitin um frostmarkið.

**Veðrið fríggjadagin**
Skýggjað og nógvur kavi. Útsynningur-vestan, 11 m/s. Hitin um frostmarkið.

## LUFTTRÝSTIÐ







## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 133 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -- | Tromsø | -2 | Moskva | -7 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 4 | Bergen | 0 | Berlin | 1 | Beijing | 0 |
| Tórshavn | 3 | Oslo | -1 | Paris | 3 | New Dehli | 14 |
| Lerwick | 1 | Stokkhólm | -5 | Madrid | 10 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 2 | Keypmannah. | 1 | Róm | 13 | Sydney | -- |
| London | 3 | Helsinki | -10 | Malorca | 12 | New York | 10 |

## VESTFALLSKYRRINDI

25. des. Mánin næstur jørðini
3. jan. Jørðin næst sólini
4. jan. Tendring

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. des. | 05:40 | 18:07 | 04:40 | 17:07 | 04:55 | 17:22 | 07:40 | 20:07 | 08:40 | 21:07 | 03:55 | 16:22 | 02:55 | 15:22 | 05:55 | 18:22 | 06:55 | 19:22 | 05:25 | 17:52 | 06:40 | 19:07 |
| 4. des. | 06:32 | 18:57 | 05:32 | 17:57 | 05:47 | 18:12 | 08:32 | 20:57 | 09:32 | 21:57 | 04:47 | 17:12 | 03:47 | 16:12 | 06:47 | 19:12 | 07:47 | 20:12 | 06:17 | 18:42 | 07:32 | 19:57 |
| 5. des. | 07:20 | 19:44 | 06:20 | 18:44 | 06:35 | 18:59 | 09:20 | 21:44 | 10:20 | 22:44 | 05:35 | 17:59 | 04:35 | 16:59 | 07:35 | 19:59 | 08:35 | 20:59 | 07:05 | 19:29 | 08:20 | 20:44 |
| 6. des. | 08:06 | 20:28 | 07:06 | 19:28 | 07:21 | 19:43 | 10:06 | 22:28 | 11:06 | 23:28 | 06:21 | 18:43 | 05:21 | 17:43 | 08:21 | 20:43 | 09:21 | 21:43 | 07:51 | 20:13 | 09:06 | 21:28 |
| 7. des. | 08:48 | 21:08 | 07:48 | 20:08 | 08:03 | 20:23 | 10:48 | 23:08 | 11:48 | - | 07:03 | 19:23 | 06:03 | 18:23 | 09:03 | 21:23 | 10:03 | 22:23 | 08:33 | 20:53 | 09:48 | 22:08 |